Tilval

# Dømi um familjuaktivitetir

Læt okkum frætta, um tit hava serlig ynski

sólorka
TÍN VERTUR ÚTI Í VERÐINI



## Fótbóltsskúli

Um nóg nógv tekna seg, kunnu vit skipa fyri okkara egna fótbóltsskúla fyri børn og ung við royndum sponskum venjarum. Okkara framtíðar fótbóltshetjur kunnu tekna til tríggjar dagar í skúlanum.



## Kajakk ella paddle

Vit eru við Miðjarahavið. Møguleikarnir fyri vatnaktivitetum eru næstan óavmarkaðir. Vit kunnu eitt nú skipa fyri kajakkrógving ella paddling.



## Svimjing, flogbóltur o.a.

Vit hava eisini nógvar møguleikar heima í Albir Garden – m.a. í svimjihyljunum og í okkara egna vatnlandi. Á myndiunum stuttleika føroyskir ungdómar sær her.









## Vakrir gongutúrar

Bæði veðurlagið og náttúran eggja til nógvar hugnaligar gongutúrar. Ein hin best umtókti er túrurin út á Faro de l'Albir – eyðkenda vitan, haðani tað um omrgunin ber til at síggja sólina rísa – og viðhvørt eisini hvalir ella springarar.